## Føroyar halda á at svína luftina

Nýggjasta uppgerðin av veðurlagsgassi vísir, at føroyska útlátið í 2007 var áleið 11 prosent hægri enn í 1990.. Hetta stendur í nýggjastu frágreiðingini hjá Umhvørvisstovuni. Nýggjastu tølini vísa sostatt, at føroyska samfelagið ikki hevur megnað at nærkast høvuðsmálinum við veðurlagssáttmálanum: at minka um útlátið av veðurlagsgassi. Nógv tann største parturin - heili 95 prosent - av útlátinum kemur frá at brenna olju. Størsti útlátsbólkurin er framvegis føroyski fiskiflotin við 34 prosentum av útlátinum, meðan húsarhaldini, SEV og akførini standa fyri ávikavist 17, 16 og 13 prosentum av samlaða føroyska útlátinum av veðurlagsgassi.



## Býráðið í Runavík skipað

Nýggja býráðið í Runavík er nú skipað við Magnusi Rasmussen sum býráðsformanni og Sæunn Ó. Hansen sum varaborgastjóra. Eisini eru føstu nevndirnar valdar við hesum formonnum: Magnus Rasmussen formaður í fíggjarnevndini, Beinta Olsen formaður í teknisku nevnd, Klæmint Østerø formaður í vinnu og havnanevndini, Kristian Gaardbo, formaður í sosialu nevnd, Bjarni Kjeld, formaður í mentanarnevndini og Arnfinn Langgaard, formaður í byggi- og býarskipanarnevndini

# Pensjónistarnir kenna seg vanvirdar

**Seinastu nógvu árini er fólkapensjónin ikki hækkað samsvarandi prísvøkstrinum, og nú sparingar skulu fremjast, standa pensjónistarnir fyrst fyri skotum**

SPARINGAR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Trý uppskot liggja í løtuni á tingborðinum, har tað tilsamans skulu sparast 10 milliónir krónur á almannaøkinum. Millum annað verður stuðulin til dagtilhaldini skerdur og útreiðslurnar av hesum fluttar yvir á kommunurnar.

Tað eru tó ikki allar kommunur, ið eru somikið væl fyri, at tær eru til reiðar at yvirtaka hesa útreiðslu, og tí er stórur vandi fyri at dagtilhaldini lata aftur. Hetta halda pensjónistarnir sera lítið um, og eru teir tí í Løgtinginum og mótmæla gongdini.

- Um dagtilhaldini lata aftur, tekur tað stóran part av trivnaðinum frá pensjónistunum kring landið, sigur Finnur Johansen, formaður í Havnar Pensjónistafelag.

Men tað er ikki bert hetta, pensjónistarnir vilja vísa sína ónøgd við. Meðan prísvøksturin hevur verið stórur seinastu árini, hevur fólkapensjónin staðið í stað.

- Prístalsreguleringin hevur verið fýra prosent, men tað eru bert ískoytini, ið verða reguleraði, og tað merkir, at tað í veruleikanum bert er hálvtannað prosent. Nú skal prístalsreguleringin setast niður til trý prosent, men tað verður í veruleikanum bert eitt prosent, vísir Finnur Johansen á.

### Samhaldsfasti ein forðing

Fólkapensjónin er seinnu árini ikki vaksin nakað, og skal nú skerjast. Politikararnir skjóta seg undir at útgjaldið úr Samhaldsfasta er hækkað, og pensjónistarnir føla at tað, sum skuldi vera eitt ískoyti, nú er blivið ein forðing hjá teimum.

- Eftir mínum tykki er Samhaldsfasti ikki nakað, tú skal halda áfram við at hava. Tað skuldi verða eitt ískoyti hjá pensjónistunum, men nú er tað í veruleikanum ein forðing hjá okkum, tí politikararnir brúka hann sum eitt argument fyri ikki at hækka fólkapensjónina, greiður Finnur Johansen frá.

Samstundis nýta politikararnir nýggju pensjónsskipanina sum skálkaskjól fyri at ikki hækka fólkapensjónina.

- Men henda skipanin kemur ikki at virka fyrr enn um eini 30 ár, og til ta tíð eru flestu av okkum ikki til longur. Tí má okkurt gerast fyri at geva pensjónistum virðilig lívskor, inntil tann nýggja skipanin er komin upp at koyra, sigur Finnur Johansen.

### Skelkað av Eidesgaard

Eitt, sum pensjónistarnir serliga hava bitið merki í seinastu tíðina er, at seinast fólkapensjónin varð lækkað, sat Jóannes Eidesgaard eisini sum fíggjarmálaráðharri. Nú aftur verður skorið frá pensjónistunum fyrst, gongur sami Jóannes Eidesgaard á odda.

- Ideologiskt sæð skuldi formaðurin í Javnaðarflokkinum verið tann seinasti, ein væntaði at síggja slíkt frá. Fólkapensjónin er bara lækkað einaferð fyrr, og tá sat hann eisini fyri fíggjarmálaráðnum, leggur Finnur Johansen dent á.

Meðan orðaskifti er í Løgtinginum um hesi málini, fylgja pensjónistarnir væl við og lurta væl eftir, hvør sigur hvat. Endamálið er at gera vart við sína ónøgd, men eisini at minnast til næsta val, hvør førdi hvørji sjónarmið fram.

Koma hesi uppskotini tí ígjøgnum, er hugsandi at serliga Javnaðarflokkurin fær eitt skot fyri bógvin frá pensjónistunum í Føroyum.



*- Ideologiskt sæð skuldi formaðurin í Javnaðarflokkinum verið tann seinasti, ein væntaði at síggja slíkt frá. Fólkapensjónin er bara lækkað einaferð fyrr, og tá sat hann eisini fyri fíggjarmálaráðnum, leggur Finnur Johansen, formaður í Havnar Pensjónistafelag, dent á. Her sæst hann í Løgtingssalinum, har pensjonistar í gjár og í dag*

# Samgongan skrumblar

**Sambært einum mótmælisskrivið, ið er sent løgmanni frá einari samlaðari andstøðu, er politikkurin hjá samgonguni eitt makkverk, og skúgvar allar fólkaræðisligar mannagongdir til viks. Løgmaður vísir hinvegin á, at teir hava sent skeivt, og at mannagongdir eru til fyri at brúka**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Ein samlað andstøða sendi í gjár løgmanni eitt mótmælisskriv ímóti handfaringini av ymiskum konkretum málum. Serliga er andstøðan ørg inn á, hvussu tíðarfreistirnar ikki verða hildnar, tí sambært andstøðuni verða nógv mál skrumblaði ígjøgnum uttan nakra veruliga viðgerð.

### Smyril Line og fíggjarkervið

Sum tvey dømir um, hvussu teir kunnu grundgeva fyri sínum útsøgnum nevnir andstøðan Smyril line og fíggjarkervið.

- Uppskotið um tilbúgving til fíggjarkervið, varð – hóast tað hevði ligið klárt og kent leingi – lagt niðan á ting við kravi um samtykt sama dag. Og uppskotið um at seta pening í Smyril Line, varð – hóast tað hevði verið kent leingi og viðgjørt í landsstýrinum – lagt niðan á ting við kravi um samtykt dagin eftir, skrivar andstøðan.

### Pensjónistar og koppseting

Eisini metir andstøðan, at samgongan ger sokallaði spariuppskot, ið bert taka frá teimum veiku, uttan at føra veruligar sparingar við sær.

- Nú leggur landsstýrið so knappliga eina røð av sonevndum "spariuppskotum" á ting, sum ikki eru veruligar sparingar á fíggjarlógini, men bert taka upphæddir frá teimum veikastu samfelagsbólkunum, skriva andstøðan eisini.

### Hava sent skeivt

Sambært løgmanni hevur andstøðan sent skeivt.

- Skrivið skuldi í veruleikanum verið sent til løgtingið. Antin til tingformannin, ella til formannin í trivnaðarnevndini, sigur løgmaður, og greiðir frá, at Løgtingið er suverent í tílíkum málum, og at løgmaður í veruleikanum ikki hevur nakað við tað at gera. Teir báðir eru Hergeir Nielsen, tingformaður, og Jákup Mikkelsen, formaður í trivnaðarnevndini.

Hóast løgmaður er av hesi áskóðan, so fer hann at svara andstøðuni.

- Eg fari at geva teimum eitt svar uppá skrivið. Tá ein samlað andstøða kemur við einum skrivið, hava teir rætt til eitt skrivligt svar, tí hetta skal takast í álvara, hóast tað ikki er rætt, at mannagongdirnar ikki verða fylgdar. Vit hava mannagongdir, har vit kunnu víkja frá vanligu freistunum, og hesar hava vit nýtt, sigur Kaj Leo Johannesen. Samstundis metir hann, at samgongan hevur verið noydd til at gera soleiðis, tí teir fingu so ringa tíð, tá CHE-samgongan bara hevði gjørt eina kladdu til fíggjarlóg.